# Tordur heldur fram

**- Tað hevur eydnast at fáa øll tey valdu umboðini aktivt við í arbeiðið, sum gerast skal næstu fýra árini, sigur Tordur J. Niclasen**

SKIPAN

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað vóru tilsamans fimm listar, sum bjóðaðu seg fram til bygdaráðsvalið í Eiðis kommunu. Av hesum fingu fýra listar umboð í komandi bygdaráðnum, sum tekur við leiðsluni, 1. januar 2005.

Á fundi, 12. november, samdist nývalda bygdaráðið um at skipa seg við borgarstjóra, varaborgarstjóra og nevndum.

Eins og í fleiri øðrum kommunum, hevur nývalda bygdaráðið í Eiðis kommunu roynt at fingið øll tey valdu umboðini aktivt við í arbeiði, sum gerast skal næstu fýra árini.

- Og hetta hevur eydnast, sigur borgarstjórin, Tordur J. Niclasen, ið heldur fram sum borgarstjóri eftir 1. januar.

Bygdaráðið í Eiðis kommunu hevur gjørt av at skipa seg við Tordi sum borgarstjóra og Anfinni Kruse sum varaborgarstjóra.

## Nevndirnar

Føstu nevndirnar hjá Eiðis kommunu verða mannaðar soleiðis:

Fíggjarnevndin: Tordur J. Niclasen, formaður, Jóhan K. Joensen og Rólant Poulsen.

Tekniska nevnd: Anfinnur Kruse, formaður, Rólant Poulsen og Jógvan K. Mørkøre.

Heilsu- og um-hvørvisnevndin: Tom Joensen, formaður, Jóhan K. Joensen og Jógvan K. Mørkøre.

Mentanarnevndin: Tordur J. Niclasen, formaður, Anfinnur Kruse og Jóhan K. Joensen.

Havnanevndin: Rólant Poulsen, formaður, Anfinnur Kruse og Tom Joensen.

Á almennum bygdaráðsfundi mánadagin klokkan 17, varð semjan í nývalda bygdaráðnum staðfest.



*Tordur J. Niclasen verður eisini borgarstjóri í Eiðis kommunu eftir, 1, januar 2005*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Merktu ikki sama stuðul hesaferð



*Sjey kvinnur vóru á teimum trimum listunum, sum bjóðaðu seg fram til valið í Runavíkar kommunu hesaferð. - Eg haldi, at allar eru væl skikkaðar at taka á seg býráðsarbeiði, men vit mugu tíverri staðfesta, at eingin av okkum vann inn um býráðsgáttina, sigur Marja Lamhauge*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**- Eg haldi, at Kongshavnar Kvinnufelag fokuseraði meira upp á kvinnurnar undan seinasta kommunuvali enn til valið hesaferð. Vit hava ikki merkt sama stuðulin nú í heyst sum fyri fýra árum síðan, sigur Marja Lamhauge, sum saman við Sæunn Ó. Hansen fall á kommunuvalinum**

KOMMUNUVAL

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Av níggju býráðslimum í Runavíkar kommunu seinastu fýra árini, eru tvær kvinnur, Marja Lamhauge og Sæunn Ó. Hansen. Men eftir 1. januar, tá ið kommunan veksur við Skála kommunu, Oyndarfjarðar kommunu og Elduvíkar kommunu, verða ellivu býráðslimir í kommununi, men eingin kvinna. Bæði Marja og Sæunn fullu á valinum, 9. november, og eingin onnur kvinna á listunum rakk inn um býráðsgáttina. Tískil verður nýggja Runavíkar kommuna eftir 1. januar bert mannað við monnum, hóast sjey kvinnur vóru á teimum trimum listunum til valið hesaferð.

Tað restaði kortini ikki nógv í, at kvinnurnar fingu fótin inn um. Bæði Tóra Árnadóttir, Sæunn Ó. Hansen og Marja Lamhauge høvdu um og út við 60 atkvøður í part.

Marja Lamhauge sigur, at tilsamans seks kvinnur eru umboðaðar í teimum kommunum, sum nú verða lagdar saman eftir 1. januar. Í Oyndarfjarðar kommunu eru tríggjar kvinnur í bygdaráðnum, í Elduvíkar kommunu ein, og í Runavíkar kommunu eru tær tvær.

- Nú fáa vit eitt býráð við ellivu monnum – og ongari kvinnu, sigur hon.

## Nógv er hent

Í Runavíkar kommunu hevur Marja Lamhauge verið formaður í sosialu nevnd og limur í havnanevndini, og Sæunn Ó. Hansen hevur verið næstformaður í sosialu nevnd. Triðji limurin hevur verið Hans T. Olsen, sum ikki læt seg stilla uppaftur á valinum seinast. Sæunn er eisini formaðurin í stýrinum fyri Eysturoyar Røktar-og Ellisheim, og hon eigur sín stóra lut í, at brekað í Eysturoy hava fingið eina skipan við flutningi.

Marja sigur, at hon sum býráðslimur og formaður í sosialu nevnd hevur lagt stóra orku í børnini, tey gomlu og sjúku.

- Tá ið vit vórðu vald í býráðið fyri fýra árum síðan, var tørvurin á barnaansing stórur. 75 børn vóru á bíðilista, men í dag er eingin bíðilisti. Tørvurin er nøktaður við nýggjum barnagarði og fleiri dagrøktarplássum.

Hon sigur, at barnagarðurin á Mýrunum varð samtyktur í býráðnum undan hesum, men hann er so bygdur og tikin í nýtslu í hesum valskeiði.

- Eitt tað fyrsta, vit gjørdu, var at seta á stovn útibarnagarð í Æðuvík.

Marja sigur, at nógv er eisini hent á økinum hjá teimum gomlu og veiku.

- Vit hava fingið fyrsta stovnin av sínum slagi í Føroyum fyri dement úti á Mýrunum, og Eysturoyar Røktar-og Ellisheim verður nú útbygt við 24 plássum aftrat. Haraftrat er økið lagt av og partvís peningur settur av til eldrasambýli í kommununi.

- Jú, sigur Marja. Eg haldi, at vit hava "knoklað" hart á sosiala økinum í hesum fýra áraskeiði, men hetta vórðu vit so ikki "løntar" fyri í nóg stóran mun, at vit náddu inn um aftur býráðsgáttina hesaferð.

## Minni fokusering

Vit spurdu eisini Marju, um tað kann hava havt sína ávirkan á valinum, at hon og Sæunn vóru millum teirra, ið eru ímóti, at kommunan gevur dansi-og skeinkiloyvi.

- Tað er ilt at siga, men eg haldi ikki, at hetta er øll orsøkin. Um so var, kundu fólk í størri mun valt aðrar kvinnur, eitt nú Tótu Árnadóttir, ið er heit talskvinna fyri hesum.

Marja heldur, at býráðsformans-effekin, sum hon tekur til, hevur ávirkað valið nógv, og hon heldur fyri, at høvdu hon, Sæunn og Tóta fingið 20 av avkvøðunum í part, sum Rodmundur Nielsen fekk, høvdu tær allar verið innanfyri – og Rodmundur eisini.

- Eitt annað, sum eg haldi hevur gjørt seg galdandi, er, at Kongshavnar Kvinnufelag í minni mun enn undan valinum fyri fýra árum síðan gjørdi sítt til at fokusera uppá kvinnurnar á listunum.

Hon vísir á, at undan valinum fyri fýra árum síðan merktu tær dyggan stuðul, men hesaferð hoyrdu tær einki frá felagnum.

- Ein valfundur var í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag, men honum skipaði Tofta Kvinnufelag fyri, sigur hon.

Sjey kvinnur vóru á teimum trimum listunum, sum bjóðaðu seg fram til valið í Runavíkar kommunu hesaferð.

- Eg haldi, at allar hesar kvinnurnar eru væl skikkaðar at taka á seg býráðsarbeiði, men vit mugu tíverri staðfesta, at eingin av okkum vann inn um býráðsgáttina hesaferð, sigur Marja Lamhauge.



# Minnilutin í Klaksvík roynir enn

**Fríggjadagin bjóðaðu Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin í Klaksvíkar kommunu Fólkaflokkinum at koma til samráðingarborðið um at skipa samgongu í Klaksvíkar býráð**

KOMMUNUVAL 04

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Javnaðarflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Sambandsflokkurin í Klaksvík hava sett seg í samband við Fólkaflokkin fyri at skipa samgongu, men fríggjanáttina skrivaðu Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin undir eina avtalu*

**Klaksvík:** Hóast avtala er gjørd millum Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin, hava hinir tríggir flokkarnir í Klaksvíkar býráði boðið Fólkaflokkinum til samráðingarborðið at gera samgongu til komandi fýra árini. Sostatt letur ikki til, at allar súður eru syftar enn.

Men Fólkaflokkurin hevur sum sagt skrivað undir eina avtalu við Tjóðveldisflokkin, og flokkarnir skuldu á fund mánakvøldið at gera eina arbeiðsætlan og at manna nevndirnar. Kortini hevur minnilutin komandi fýra árini sett seg í samband við Fólkaflokkin. Eyðgunn Samuelsen úr Javnaðarflokkinum sigur, at Javnaðarflokkurin ikki bara hevur sett seg afturá, sum nú er.

Hava tit boðið Fólkaflokkinum borgarstjórasessin?

– Vit hava boðið Fólkaflokkinum til at koma til samráðingar, har vit eru er opin fyri at kjakast um alt. Samstarvsavtalan, sum tey hava gjørt, er rættiliga smøl og harvið meta vit hana ikki vera so góða fyri býin. Tí settu vit okkum í samband við Fólkaflokkin.

Tilboðið varð givið fríggjadagin, men enn hava tey, sambært Eyðgunn, onki svar fingið frá Fólkaflokkinum.

Kunnu tit loyva tykkum at gera so, tá ein avtala longu fyriliggur?

– Tjóðveldisflokkurin gjørdi so skjótt av, tá tað var slitnað hjá okkum, at vit als ikki fingu ein møguleika at kontakta Fólkaflokkin, og vit høvdu longu verið í sambandi við Fólkaflokkin, áðrenn sitandi meiriluti sessaðist til samráðingar. Men vit vildu halda okkum til ta avtaluna um samráðingar við sitandi meiriluta, áðrenn vit hugdu at øðrum møguleikum. Tá tær slitnaðu leyp Tjóðveldisflokkurin í føvningin á Fólkaflokkinum, og hildu vit so, at vit eins væl kundu loyva okkum at kontakta flokkin.

Eyðgunn Samuelsen sigur, at Javnaðarflokkurin varð framstillaður sum ómøguligur av Steinbjørn Jacobsen, men tað hevur onki við veruleikan at gera.

Hon heldur, at Tjóðveldisflokkurin hevur mist meira við avtaluni við Fólkaflokkin enn um tey høvdu tikið av onkrum av teimum avtalunum, sum lógu á samráðingarborðinum hjá sitandi meiriluta.

# Fyrilestrarøð á Fróðskaparsetrinum

**Í vetur og vár fer Fróðskaparsetur Føroya at skipa fyri eini røð av almennum fyrilestrum við heitinum Myndlar og tøl**





*Martin og Petur Zachariassen fara at halda fyrilestur hóskvøldið 18. november kl. 20 í Ovastovu í Nóatúni*

TÍPINDASKRIV

*Fróðskaparsetur Føroya*

Tilsamans átta fyrilestrar vera á skránni, og evnini eru rættiliga fjølbroytt. Í fyrsta fyrilestrinum fara Petur og Martin Zachariassen at greiða frá ymsum háttum at rokna atkvøður um til tingsessir.

Seinni verður greitt frá, hvussu geislavirkin dálking hevur verið í Føroyum seinastu mongu árini, og hvat er í luftini, sum vit anda her í Føroyum.

Samspælið millum streym og aldu verður tikið upp í einum øðrum fyrilestri, og seinni um tað er møguligt at rokna streymin nóg neyvt til, at álítandi metingar kunnu verða gjørdar av, hvussu eitt møguligt útlát spjaðist við streyminum.

Beint eftir nýggjár verður fyrilestur um útgerð til aling á harðbalnum økjum. Ein fyrilestur verður um fjarskifti í Føroyum. Seinasti fyrilesturin er um ríka lívið, sum er undir vatnskorpuni á Føroya Banka.

**Frá atkvøðum til tingsessir**

Fyrsti fyrilesturin í røðini verður hóskvøldið 18. november kl. 20 í Ovastovu í Nóatúni. Tá fara Petur Zachariassen, hagfrøðingur og Martin Zachariassen, teldufrøðingur at halda fyrilesturin "Frá atkvøðum til tingsessir".

Hvussu fæst eitt lutfalsligt tingmannabýti í mun til atkvøðubýtið?

Hesin greiði spurningur hevur einki einfalt svar. Fleiri útrokningarhættir hava verið nýttir í valskipanum kring heimin. Hvat siga royndirnar, og hvørji ástøðilig úrslit eru tøk um henda spurning?

Í fyrilestrinum fara Martin og Petur at nýta ymsar hættir til løgtingsvalini 1978-2004 samanbornir við galdandi valskipan. Í fyrilestrinum verður eisini víst á ein nýggjan tvílutfalsligan útrokningarhátt, har lutfalslig javnvág fæst í tingmannabýtinum bæði í mun til flokkar og valdømi.

Petur Zachariassen er útbúgvin støddfrøðingur frá Universitetinum í Århus og hevur starvast sum lektari í hagfrøði og støddfrøði á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum síðani 1974.

Martin Zachariassen er útbúgvin teldufrøðingur frá Fróðskaparsetrinum og Universitetinum Keypmannahavn. Í 1998 vardi Martin Ph.D. heiti á Universitetinum í Keypmannahavn. Hann starvast sum lektari á Datalogisk Institit á Universitetinum í Keypmannahavn og er adjungeraður lektari í teldufrøði við Náttúruvísindadeildina á Fróðskaparsetrinum.

Skráin fyri fyrilestrarøðina er hendan:

18. november 2004
Petur Zachariassen og Martin Zachariassen: "Frá atkvøðum til tingsessir" Ð- um útrokningarhættir í sambandi við løgtingsval.

9. desember 2004
Hans Pauli Joensen: "Geislavirkin dálking í Føroyum seinastu 40 árini."

6. januar 2005
Øystein Patursson: "Aliringar til harðbalin økir" Ð- um at menna aliútgerð.

27. januar 2005
Magnus Danielsen: "Fjarskifti í Føroyum"

17. februar 2005
Knud Simonsen: "Streym til drív- og leitiskipanir á landgrunninum"

10. mars 2005
Trygvi Vestergaard: "Hvat anda vit?" Ð- um úrslit frá luftkanningum í Føroyum

31. mars 2005
Bárður Niclassen: "Spæla alda og streymur saman á landgrunninum"

21. apríl 2005
Eyðfinn Magnussen: "Føroya Banki Ð- eitt vakstrarparadís hjá fiski

Jákup Mikkelsen:

# Vit halda okkum til verandi avtalu



*– Vit halda okkum til avtaluna, sum vit gjørdu við Tjóðveldisflokkin fríggjanáttina, sigur Jákup Mikkelsen úr Fólkaflokkinum*

**Fólkaflokkurin í Klaksvík fer at halda seg til ta gjørdu avtaluna við Tjóðveldisflokkin, sum varð gjørd fríggjanáttina**

KOMMUNUVAL 04

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Jákup Mikkelsen úr Fólkaflokkinum sigur, at hann fekk eina uppringing fríggjakvøldið, har boðið varð honum og restini av floksumboðunum at koma til samráðingar um at skipa samgongu í Klaksvíkar kommunu komandi fýra árini. Jákup Mikkelsen sigur, at hann svaraði tilboðnum beinanvegin í telefonini, har hann segði, at Fólkaflokkurin hevur gjørt eina avtalu við Tjóðveldisflokkin, og at tey fara at halda seg til hana.

– Tað bleiv sagt, at eg kundi fáa meira enn eg havi við verandi avtalu, men eg eri púra avklára ður við ta avtaluna, sum vit hava gjørt við Tjóðveldisflokkin. So óansæð hvussu freistandi ein borgarstjórasessur kann vera, so hevði eg ikki kunnað livað við at fingið hann, tí eg valdi at leypa frá einari aðrari avtalu, sigur Jákup Mikkelsen púra avgjørdur.

Er tað ein samdur Fólkaflokkur, sum hevur tikið hesa avgerðina?

– Eg havi ikki tikið tað upp við hini, men eg eri sannførdur um, at tey eins og eg ikki vilja leypa frá einari gjørdari avtalu.

Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin skuldu fara á fund mánakvøldið klokkan 19 at leggja eina arbeiðsætlan fyri komandi fýra árini og at manna tær ymsu nevndirnar.

**Í sambandi við, at Javnaðarflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Sambandsflokkurin hava boðið Fólkaflokkinum til samráðingar, hava flokkarnir sent út soljóðandi tíðindaskriv:**

**Javnaðarflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Sambandsflokkurin hava boðið Fólkaflokkinum í samgongusamstarv tey komandi 4 árini í Klaksvíkar Kommunu.**

**Vit meta, at ein samgonga ímillum áðurnevndu flokkar, vil vera til størri frama fyri Klaksvíkina og kommununa sum heild, enn tað samstarv, ið Fólkaflokkurin hevur fráboðað.**